HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Tann 25.06.2020
Mál: 20/00540

Millum undirritaðu:

Heilsumálaráðið

og

Smyril Line

er í dag gjørdur hesin:

**SAMSTARVSSÁTTMÁLI**

í sambandi við corona-kanningar frá 27. juni til 10. juli 2020

**Endamál**
**§ 1**

Epidemikommissiónin hevur, sambært § 16, stk. 1 í epidemilógini, álagt øllum, sum koma til Føroya í tíðarskeiðinum frá og við 27. juni til og við 10. juli 2020, at lata seg kanna fyri COVID-19 av einum lækna ella einum, sum arbeiðir eftir delegatión frá lækna. Boðini verða fylgd soleiðis, at øll, sum koma til Føroya í tíðarskeiðinum verða kannað við innferð. Løgtingið hevur í hesum sambandi játtað 4 mió. kr. til endamálið.

Heilsumálaráðið og Smyril Line innganga í hesum sambandi í samstarv um, at corona kanningar verða gjørdar av ferðandi, ið ferðast við Norrønu til Føroya frá og við 27. Juni og til og við 10. Juli 2020. Hetta soleiðis, at kanningarstova eftir delegatión frá lækna, ger hesar kanningar fyri Smyril Line.

Partarnir meta, tað hava týdning at leggja fastar karmar kring samstarvið millum partarnar, soleiðis at kanningarnar verða gjørdar á besta og tryggasta hátt.

Endamálið við hesum sáttmála er at leggja karmarnar um samstarvið millum partarnar um at gera corona-kanningar av ferðandi, ið ferðast við Norrønu til Føroya í tíðarskeiðinum frá og við 27. juni 2020 og til og við 10. juli 2020.

**Uppgávur hjá Smyril Line**
**§ 2**

Smyril Line skal tryggja sær, at tey starvsfólk, ið arbeiða við at gera corona kanningarnar, arbeiða eftir delegatión frá lækna sambært autorisatiónslógini og "bekendtgørelse om autoriserede sundhedspersoners benyttelse af medhjælp". Smyril Line skal tryggja sær, at tey starvsfólk, ið testa tey ferðandi, eru skikkaði til at útføra uppgávuna og hava fingið vegleiðing frá lækna at gera testirnar.

Smyril Line skal tryggja sær, at ásetingar í danskari lóggávu um vernd av persónsupplýsingum eru hildnar.

Smyril Line skal í sambandi við hendan sáttmála tryggja, at fylgjandi uppgávur verða framdar:

- at fólk verða pota og potistøð verður sett upp,
- at COVID-19 analysur av tiknum royndum, verða gjørdar,
- at fólk verða sett at gera kanningar og greiningar,
- at kit til kanningar verða leverað,
- at fakførleiki í sambandi við samstarvið, verður veittur.

Smyril Line tryggjar sær, at kanningarstovan, ið ger corona-kanningarnar, einans hevur pseudonymiseraðar persónupplýsingar um hendi, og sostatt m.a. ikki kann knýta kanningarúrslit beinleiðis til ávíst ferðafólk.

Um ferðafólk, sum koma við Norrønu verða testað negativ fyri corona, tryggjar Smyril Line, at kanningarnar verða burturbeindar.

Um eitt ella fleiri ferðafólk verða testað positiv fyri corona, tryggjar Smyril Line, at Landslæknin í Føroyum fær boð beinanvegin bæði telefoniskt og skriftligt. Síðani tryggjar Smyril Line, at kanningarnar verða burturbeindar.

Allar persónsupplýsingar, sum eru knýttar at kanningunum, verða somuleiðis burturbeindar eftir at kanningin er gjørd.

Rættur til endurgjald fyri skaða í sambandi við kanning er reguleraður í galdandi lóggávu um klagu- og endurgjaldsmøguleikar innan heilsuverkið. Smyril Line tryggjar í hesum sambandi, at kanningarstovan, ið ger kanningarnar, hevur neyðugar tryggingar.

**Uppgávur hjá Heilsumálaráðnum**
**§ 3**

Heilsumálaráðið skal í sambandi við hendan sáttmála gera fylgjandi uppgávu:

- Frá og við 27. juni til og við 10. juli 2020 innistanda fyri gjaldi til Smyril Line fyri tær corona-kanningar, sum eru fevndar av hesum sáttmála.

**Avgerðir og dispositiónsrættur úteftir**
**§ 4**

Hvør okkara kann taka allar neyðugar og vanligar avgerðir í sambandi við raksturin av felags virkseminum sambært hesum sáttmála.

Broytingar av hesum sáttmála krevja semju millum partarnar.

**Tilfar frá kanningum v.m.**
**§ 5**

Smyril Line tryggjar, at kannað verður bert fyri Covid-19. Tá kanningarnar eru lidnar og úrslitið fyriliggur, verður tilfarið burturbeint.

Starvsfólk, ið arbeiða við kanningunum, hava tagnarskyldu um allar upplýsingar, sum tey fáa í sambandi við kanningarnar sambært hesum sáttmála.

**Fakturering**
**§ 6**

Rindað verður fyri skjalfestar útreiðslur fyri kanningar. Rindað verður tó í mesta lagi 500 kr. fyri hvørja corona kanning, sum verður gjørd.

Smyril Line sendir rokning eina ferð, við nøktandi skjálprógvum, til Heilsumálaráðið.

**Uppsøgn og mishald**
**§ 7**

Sáttmálin er galdandi frá og við 27. juni til og við 10. juli 2020.

Um ein partur munandi misheldur skyldur sínar sambært sáttmálanum, kann hin parturin siga sáttmálan upp uttan uppsagnartíð.

Hevur ein partur við at mishalda sáttmálan elvt hinum fíggjartap, ábyrgist viðkomandi samsvarandi vanligum reglum um endurgjald.

**Verndarting**
**§ 8**

Allar ósemjur um tulking av hesum sáttmála skulu avgerast eftir teimum reglum, sum til hvørja tíð eru galdandi í Føroyum og kunnu leggjast fyri Føroya rætt.

Tórshavn, tann 25/6 - 2020 Tórshavn, tann 25/6 - 2020

Heilsumálaráðið
Turid Arge, aðalstjóri

Smyril Line
Rúni Vang Poulsen, stjóri

Tann 24.06.2020
Mál: 20/00554
Viðgjørt: BL

Millum undirritaðu:

Heilsumálaráðið

og

Spf. Thetis

er í dag gjørdur hesin:

# SAMSTARVSSÁTTMÁLI

í sambandi við corona-kanningar í Føroyum frá 27. juni til 10. juli 2020

## Endamál
## § 1

Epidemikommissiónin hevur, sambært § 16, stk. 1 í epidemilógini, álagt øllum, sum koma til Føroya í tíðarskeiðinum frá og við 27. juni til og við 10. juli 2020, at lata seg kanna fyri COVID-19 av einum lækna ella einum, sum arbeiðir eftir delegatión frá lækna. Boðini verða fylgd soleiðis, at øll, sum koma til Føroya í tíðarskeiðinum verða kannað við innferð. Løgtingið hevur í hesum sambandi játtað 4 mió. kr. til endamálið.

Heilsumálaráðið og Spf. Thetis innganga í hesum sambandi í samstarv um, at Thetis skal gera hesar corona-kanningar í Føroyum. Hetta eftir delegatión frá Pál Weihe, yvirlækna, Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu.

Partarnir meta, tað hava týdning at leggja fastar karmar kring samstarvið millum partarnar, soleiðis at kanningarnar verða gjørdar á besta og tryggasta hátt.

Endamálið við hesum sáttmála er at leggja karmarnar um samstarvið millum partarnar um at gera corona-kanningar í Føroyum í sambandi við, at øll ferðandi til Føroya skulu kannast fyri COVID-19 við innferð til Føroya við flogfari og skipi, í tíðarskeiðinum frá og við 27. juni 2020 og til og við 10. juli 2020.

**Uppgávur hjá Thetis**
**§ 2**

Tað er Heilsuverk Føroya, Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu, ið stendur fyri kanningunum. Pál Weihe, yvirlækni og leiðari fyri Deildini fyri arbeiðs- og Almannaheilsu, er ábyrgdarhavandi yvirlækni fyri kanningunum. Thetis og tey starvsfólk, ið gera potingar, arbeiða eftir delegatión frá Pál Weihe, jb. § 18 í autorisatiónslógini (anordning nr. 1472/2013) og bekendtgørelse 613/2014 om autoriserede sundhedspersoners benyttelse af medhjælp. Pál Weihe tryggjar sær, at tey starvsfólk, ið testa tey ferðandi, eru skikkaði til at útføra uppgávuna og hava fingið vegleiðing frá honum í at gera testirnar.

Thetis skal í sambandi við hendan sáttmála gera fylgjandi uppgávur:

- Pota fólk og í tí sambandi seta potistøðir upp.
- Gera COVID-19 analysur av royndunum, sum verða tiknar
- Hava og reka kanningarstovu
- Seta fólk at gera kanningar og greiningar
- Levera kit til kanningar
- Veita fakførleika í sambandi við samstarvið.

Kanningar, sum verða gjørdar á Vága Floghavn, verða framdar av fyritøkuni Thetis. Thetis ger kanningar fyri heilsuverkið. Tað merkir, at tað er Heilsuverk Føroya, Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu, sum sbrt. § 2, nr. 4 í persónsupplýsingarlógini er dátuábyrgdari, og tí sum dátuábyrgdari ásetir endamálið við viðgerðini. At Thetis fremur kanningarnar í verki merkir, at Thetis er dátuviðgeri, sbr. § 2, nr. 5 í persónsupplýsingarlógini, og tí viðger persónsupplýsingar vegna Deildina fyri arbeiðs- og almannaheilsu. Dátuviðgerðaravtala sbrt. § 31 í persónsupplýsingarlógini verður gjørd.

Kanningarskipanin verður gjørd soleiðis, at Thetis sum dátuviðgeri einans hevur pseudonymiseraðar persónupplýsingar um hendi, og sostatt m.a. ikki kann knýta kanningarúrslit beinleiðis til ávíst ferðafólk.

Um øll ferðafólk, sum koma við sama flogfari verða testað negativ fyri corona, letur Thetis Deildini fyri arbeiðs- og almannaheilsu boð um hetta. Allar kanningar, sum eru gjørdar verða burturbeindar hjá Thetis. Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu gevur flutningsfelagnum boð um, at øll vóru testað negativ.

Um eitt ella fleiri ferðafólk verða testað positiv fyri corona, letur Thetis allar kanningar til Deildina fyri arbeiðs- og almannaheilsu. Avrit av persónsupplýsingum ella kanningum verða ikki goymdar hjá Thetis. Pál Weihe, yvirlækni, letur beinanvegin upplýsingarnar telefoniskt og skriftligt til Landslæknan, sbrt. Bekendtgørelse nr. 189 af 10. marts 2020 for Færøerne om lægers anmeldelse af COVID-19.

Verða eitt ella fleiri ferðafólk testað positiv verða kanningarnar (og upplýsingarnar) sostatt ikki burturbeindar beinanvegin av Thetis, men verða kvalitetskannaðar o.a. á Deildini fyri arbeiðs- og almannaheilsu. Eisini er tað Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu, sum gevur Landslæknanum boð um, at eitt ella fleiri ferðafólk eru testað positiv. Aftaná verða hesar kanningar burturbeindar.

Allar persónsupplýsingar, sum Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu viðgerð, verða goymdar í tryggum skipanum á deildini.

Rættur til endurgjald fyri skaða í sambandi við kanning er reguleraður í "anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet".

Thetis tryggjar sær góðkenning frá Dátueftirlitinum til hesa verkætlan sambært løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum.

**Uppgávur hjá Heilsumálaráðnum**

**§ 3**

Heilsumálaráðið skal í sambandi við hendan sáttmála gera fylgjandi uppgávu:

• Frá og við 27. juni til og við 10. juli 2020 innistanda fyri gjaldi til Thetis fyri tær corona-kanningar, sum eru fevndar av hesum sáttmála.

**Avgerðir og dispositiónsrættur úteftir**
**§ 4**

Hvør okkara kann taka allar neyðugar og vanligar avgerðir í sambandi við raksturin av felags virkseminum sambært hesum sáttmála.

Broytingar av hesum sáttmála krevja semju millum partarnar.

**Tilfar frá kanningum v.m.**
**§ 5**

Thetis ger kanningarnar og veitir úrslit av kanningunum seinast kl. 12:00 dagin eftir, at kanningnar eru gjørdar.

Thetis kannar bert fyri Covid-19. Tá kanningarnar eru lidnar og úrslitið fyriliggur, verður tilfarið hjá Thetis burturbeint.

Starvsfólk hjá Thetis hava tagnarskyldu um allar upplýsingar, sum felagið og starvsfólk felagsins fáa í sambandi við kanningarnar sambært hesum sáttmála.

**Fakturering**
**§ 6**

Thetis fakturerar kr. 390,00 fyri hvørja vanliga corona-roynd, sum verður gjørd.

Eina ferð um vikuna verður rokning send til Heilsumálaráðið.

**Uppsøgn og mishald**
**§ 7**

Sáttmálin er galdandi frá og við 27. juni til og við 10. juli 2020.

Um ein partur munandi misheldur skyldur sínar sambært sáttmálanum, kann hin parturin siga sáttmálan upp uttan uppsagnartíð.

Hevur ein partur við at mishalda sáttmálan elvt hinum fíggjartap, ábyrgist viðkomandi samsvarandi vanligum reglum um endurgjald.

**Verndarting**
**§ 8**

Allar ósemjur um tulking av hesum sáttmála skulu avgerast eftir teimum reglum, sum til hvørja tíð eru galdandi í Føroyum og kunnu leggjast fyri Føroya rætt.

Tórshavn, tann 24/6 - 2020 Tórshavn, tann 24/6 - 2020

Heilsumálaráðið Spf. Thetis

Fyrivarni fyri gildiskomu av hesum sáttmála:

Umsókn er send Dátueftirlitinum um góðkenning av hesi verkætlan. Góðkenning er ikki enn fingin frá Dátueftirlitinum. Partarnir eru samdir um, at hesin sáttmáli kemur ikki í gildi, áðrenn góðkenning er fingin til vega frá Dátueftirlitinum til verkætlanina.